# Toll- og Skattstova Føroya

Í Fíggjarmálaráðnum húsast sjálvt Fíggjarmálaráðið, Føroya Gjaldstova, Hagstova Føroya og Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Í Fíggjarmálaráðnum starvast 90 fólk.

Í deildunum hjá Toll- og Skattstovuni kring landið starvast 140 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

## Starvsfólk til Fíggjarmálaráðið

**Søkt verður eftir starvsfólki til móttøkuna í Fíggjarmálaráðnum at byrja sum skjótast.**

## Starvsfólk til móttøkuna

**Høvuðsuppgávur í móttøkuni eru:**
- at svara telefonunum hjá Fíggjarmálaráðnum, Gjaldstovuni, Hagstovuni og Toll- og Skattstovuni
- at avgreiða viðskiftafólki, sum koma í Fíggjarmálaráðið
- at svara fyrispurningum frá borgarum og virkjum, og senda skrivligt tilfar til borgarar og virkir
- at gera aðrar fyrifallandi uppgávur fyri stovnarnar í Fíggjarmálaráðnum

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava 9. floks prógv. Royndir frá líknandi starvi eru ein fyrimunur. Tað setti skal vera fyrikomandi, kundavinarligur og hava góðan málburð á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið er flokkað í 1. lf., og er fulltíðarstarv.

**Setanarøki**
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Hansen á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

***29. januar 2007***

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

Merk brævbjálvan: »Umsókn«



# Hjúnalega

Tit eru hjartaliga vælkomin á hjúnaleguna, sum verður á Hotel Vágum í vikuskiftinum 26.-28. januar 2007.

Kostnaðurin er kr. 2.400,- fyri hjún. Pláss er fyri 24 hjúnum. Enn eru pláss eftir.

Tekningargjaldið er kr. 400,- sum er íroknað samlaða kostnaðin.

Til ber at tekna seg við at ringja 313508 innan 17. januar 2007.

Undirvísari verður Eivind Frøen.

*Hjartaliga vælkomin!*







